VALGREINAR

Fólkaskúlin

Andrea Eldevig
valevni Tjóðveldisfloksins í Suðuroy

Skipaði skúlaviðurskiftir hava verið í Føroyum seinastu 100 - 150 árini, og hevur ein menning av skúlaviðurskiftunum eisini verið stór.

Skulu vit her nevna viðurskiftini hjá fólkaskúlanum seinastu uml. 50 árini, eru eisini broytingar hendar, har tað hevur verið hvønn mans lutur at gingi í skúla undir skipaðum viðurskiftum, og kann sigast, at allir samfelagsbólkar hava havt møguleikan at ganga í skúla.

Vanligi barnaskúlin var í øllum býum/bygdum, har øll børn, so at siga gingu í skúla, har fjøldin av skúlabørnunum fingu førleika at lesa og skriva, meðan tað vóru børn, ið av ymiskum brekum ikki fingu henda førleikan, og fleiri teirra so fingu møguleikan at fáa førleika á serskúla, sum øllum kunnugt var á Frælsinum í Havn.

Serliga hesi, ið fingu sín bókliga førleika á sernámsskúlanum á Frælsinum, ið gjørdi eitt megnar arbeiði, máttu heiman, og var hetta ikki altíð tað, hesi ella familja teirra vildi, og var mett, at fólkaskúlin skuldi vera fyri øll í heimbygdini/-býnum, sum tann skúlaskipanini, vit í dag hava, byggir á.

Í hesi grein er ikki alt tikið við, tí so vildi verði ov drúgført.

Lat okkum tí hyggja eftir skúlaskipanini í dag, hvussu hendan skipanin virkar í dagligdegnum.

Fólkaskúlin fyri øll er ein skipan, har øll børn skulu fáa sína frálæru á sama stað, við teimum lærarum, sum nú einaferð eru á staðnum, og er hetta missjavnt, hvussu hetta eydnast, og haldið eg, at her er okkurt, ið ikki er, sum tað skal vera.

Við hesi verandi skipanini, og tí orkukarmi, ið flestu skúlunum verður tillutað, tykist hetta mangan at gera, at næmingar, ið ikki hava serligan tørv, mega liða undir, at tey við serligum tørvi taka ov nógv orku , og eisini umvent, soleiðis at báðir partar verða við skerdan lut.

Hetta, tí játtanin, og kanska eisini førleikin á skúlanum við útbúnum lærarum, ikki er til staðar.

Fólkaskúlin fyri øll, ljóðar væl, men er hann nú so góður fyri øll?

Hugsan mín er, at vit skulu hava hetta mál, at fólkaskúlin skal verða fyri øll, at øll skulu hava møguleika til at fáa frálæru, og fáa optimalt við teim evnum, tey hava, men hetta ikki skal gerast á sama stað, ella somu tíð.

Vit eiga at fáa sett á stovn skúla/-skúlaskipan, ið tekur útgangsstøði í, at flest teirra eru í heimligum umhvørvi, og at skúlin tekur sær av fjøldini, ið ikki hevur serligan tørv, á teim vanligu skúlunum við teim vanliga útbúnu lærarum, meðan vit eiga at skipa skúla fyri tey, ið hava serligan tørv fyri neyðini, við lærarum, við serligari útbúgving og í umhvørvið, har tey fáa mest møguligt burturúr.

Eitt nútíðar samfelag eigur at kunna geva hvørjum næmingi eina frálæru, hvør einstakur næmingur hevur brúk fyri, á tí støði, viðkomandi hevur evnir til, og kann geva frálæru, so næmingurin fær optimalt burturúr frálæruni.

Hvør segði, at vit øll skulu verða proffessara, lat okkum geva teim, ið kanska ikki hava tey stóru bókligu evnini, eina frálæru, tey megna, og sum samgfelagið eisini hevur brúk fyri, tí, samfelagið hevur brúk fyri okkum øllum.

Hesum málið vil Tjóðveldisflokkurin arbeiða fyri, og er hetta eitt evni, eg serliga vildi arbeitt fyri, eins og alt okkara samfelag verður laga til føroysk viðurskifti, ið ikki stendur aftanfyri altjóðaviðurskifti.

Gott val.

Eysturoyggin skapar tey størstu virðini

Edmund Joensen
løgtingsmaður og valevni Sambandsfloksins í Eysturoy

Tað er Eysturoyggin sum skapar tey størstu samfelagsvirðini í føroyska búskapinum. Hon er sjálvur krumtappurin, bæði beinleiðis og óbeinleiðis. Beinleiðis við síni framleiðslu og óbeinleiðis við at vera sambandsháborgin.

Hvør einasta bygd í Eysturoynni eigur sín leiklut í hesum veruleika, ár undan ári.

Men tí er tað eisini Eysturoyggin, sum fær tær størstu rokningarnar fyri yvirtøkur og niðurskurð í ríkisveitingini so hvørt sum tær koma.

Hvar skulu loysningarmenn annars fara við rokningini enn til tey sum skapa virðini og peningin at gjalda við ?

Valið hin 20. komandi

Tá fari verður á val er tað sjálvandi fyri at velja fólk og flokkar, sum vilja betra um samfelagið, fólk sum vilja betra um vinnumøguleikarnar, og møguleikarnar annars hjá føroya fólki. Vit kunnu tí ikki halda fram við einum stýri í Føroyum, sum ger umstøðurnar verri hjá Eysturoynni og hjá føroya fólki. Tað er júst eitt slíkt stýri, vit hava havt 5-6 seinastu árini. Tí mugu vit øll brúka valmøguleikan 20., so vit fáa røttu leiðslluna fram yvir.

Landstýrið kom til skorin klæði

Sitandi landsstýri og samgonga hava floti á einari hákonjunkturaldu sum ikki er sædd í Føroya søgu. Fiskiflotin vard saneraður í botn við eyka stuðli og bíligum lánum úr Danmark. Framleiðsluvinnan á landi varð sanera á sama hátt. Metstórar fiskanøgdir, methøgir fiskaprísir, metlág renta, rímuligir orkuprísir, ongir vansar av nøkrum slag.

Úrslitið aftaná hákonjunkturalduna miklu:

1. Skattatrýstið er eitt tað hægsta í Europa.
2. Fíggjarlógin er hækkað við umleið 1.200 millionum kr.
3. Yvirtøkur, lækkaður blokkur v.m. kosta umleið 400 miljónir kr. um árið
4. Kostnaðarstøði er hækkað og kappingarførið er minkað so nógv, at fiskanøgdin sum fer av landinum óvirkað, veksur alsamt.
5. Arbeiðararfeløgini eru sjálvkravd farin at tala at, og eru byrjaði at tosa um lønarsteðg.

Nógv onnur dømir kundu verið nevnd. Vit hoyra vinnulívsmenn innan nærum allar vinnugreinar, aling, rækjuveiðu, feskfiskaveiðu, framleiðslu á landi, peningastovnar o.a. um peningi, sum landsstýrið ikki náddi at brúka, hevur tað goldið forút, ella áðrenn tíðina, til danska statin, og harvið minkað um okkara likviditetsmøguleikar. Fíggjarlógini fyri 2004 hevði víst, og kemur eisini at vísa, risastórt hall.

Boð eftir Sambandsflokkinum

Nú skal aftur ruddast upp eftir loysingarflokkarnar. Vit hava gjørt tað fyrr, og eru til reiðar at gera tað aftur. Vit biðja um tykkara stuðul 20 jan. Liberalur sambandspolitikkur er "inn" í framkomna heiminum. Samstarv og samvinna imillum lond er loysunarorðið í dag. Sambandsflokkurin er sostatt einasta alternatívið.

Latið okkum standa saman til hetta valið, og verja okkara grundlógartryggjaðu rættindi. Rættindi sum eru altavgerandi fyri menningina av føroyska samfelagnum. Sambandsflokkurin, og bert hann, hevur loysnirnar.

Í hjørtum okkara býr frælsi

Sunniva Kollslíð
valevni Tjóðveldisfloksins í Norðurstreymoy

Tað verður mangan flent at, at vit Tjóðveldisfólk eru droymarar og bert hugsað við hjartanum - og ikki við høvdinum, í sambandi við sjálvstýrismálið.

Mín áskoðan er, at vit altíð eiga at nýta bæði høvd og hjarta, tá vit taka støðu, óansað hvat málið snýr seg um, tí ikki fyrr enn tá - er avgerðin hin rætta.

Um tú bert nýtir høvdið, so er avgerðin bert hálv, men tá tú eisini tekur støðu til tað, sum tú kennir innast inni, tá hevur tú ikki bert tikið støðu til egin áhugamál, men eisini við atliti til tín granna, til títt umhvørvi og til tað land, sum vit øll eru góð við.

Úrslitið valdagin 20. januar 2004 kann lættliga gerast ein lagnudagur fyri sjálvstýrismálið, og tí fari eg at heita á tykkum veljarar, um bæði at nýta høvd og hjarta valdagin, og velja trygdina fyri, at vit ikki endaliga verða innlimað í danska kongaríkið sum ávísir flokkar ætla, tí um tað hendir, so vendist ikki aftur!

Farið tí á val, og gevið Tjóðveldisflokkinum tykkara stuðul á valdegnum 20. januar 2004.

Í Suðuroynni skulu verandi og komandi vinnur hava bestu karmar at arbeiða undir

Johan Dahl
løgtingsmaður og valevni Sambandsflokkin

Mál okkara skal verða at fáa Suðuroynna at blómað.

Har sum vinnulívið kann nørast og vaksað seg sterkt, - har trivist fólk, - tí tey síggja at framtíðar livilíkindi undir tryggum karmum eru verd at stríðast fyri.

Vit skulu stríðast hond í hond fyri at gera korini og framtíðina í oynni góð, - so fólkatalið í oynni aftur økist og aldurspyramidan fer at venda rætta vegin.

Tey ungu, sum hava fingið sær góðar útbúgvingar heima og uttanlands skulu hava nakað at komað aftur til, tí er neyðugt at nýggjar vinnur, gransking og nýggj og ella øking av verðandi almennum arbeiðsplássum, fáa fótafesti í oynni eins og komandi íverksetarir fáa vegleiðing og stuðul ,til at stovnað egið virkið.

Eisini má mál okkara verða at skapað fleiri kvinnurelaterað arbeiðsplass t.d. inn heilsur og røkt.

Vit hava bygt land í mong ártíggjur og vilja framhaldandi byggja land, - ver tú við at hjálpa okkum áhaldandi at byggja land og tryggja vælferðina , við at seta kross tín við Sambandsflokkin tann 20.januar - tað angrar tú ikki.

VALGREINAR

Stuðulsfrí vinna

Sophus E. Dal Christiansen
valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Fyri at tryggja framburð og vælferð í samfelagnum krevst eitt sunt og dynamiskt vinnulív. Trygdin fyri einum vælvirkandi vinnulívi er, at greiður skilnaður er ímillum ta politisku skipanina og vinnulívið.

Løgtingið hevur saman við vinnumálaráðnum til uppgávu at skapa tryggar karmar um vinnulív okkara, so at besta úrtøkan kann fáast burtur úr okkara væl útbúna fólki og arbeiðarafjøld.

Fiskivinnan er okkara høvuðsvinna, men týðandi er, at ein strategi verður lagd, ið hevur til uppgávu at menna nýggjar vinnur og marknaðir.

Fiskiloyvini eru Føroya fólks ogn, og eigur lógin um vinnuligan fiskiskap at verða avloyst av einum fiskidagamarknaði. Harvið sleppa vit undan tí tilvildarligu áseting, sum fer fram í dag.

Í einum fiskidagamarknaði verða loyvini bjóðað út á einum fríum marknaði, har tey mest kappingarføru feløgini fáa fiskiloyvi í ávist tíðarskeið. Henda skipanin er geiðari og rættvísari, og gevur ungum og virkisfúsum møguleikan at royna seg í fiskivinnuni.

Ali- og rækjuvinnan eru í fíggjarligari kreppu, og róð hevur verið framundir, at tað almenna eigur at stuðla hesum báðum fíggjarliga, men vit føroyingar hava ringar royndir av, at tað almenna stýrir vinnuni. Tí er kravið: Greiðan skilnað millum politisku skipanina og vinnulívið.

Umráðandi er, at útlendskur kapitalur kemur inn í alivinnuna. Um rætt verður atborið við einum skynsamum vinnupolitikki, har ræðisrætturin er á føroyskum hondum, verður eingin trupulleiki, at útlendskir ílleggjarar seta meira pening (50% ella meir) í alivinnuna.

Viðv. rækjuvinnuni er vinnan noydd at tillaga seg marknaðinum, sum hann er í dag. Týdningarmikið er at reiðaríini finna sær rakstrartól, sum eru ódýrari í rakstri og lønandi. Tað almenna Føroyar eigur ikki at hjálpa við stuðli úr landskassanum.

Eisini eigur ein komandi samgonga at tilrættisleggja eina skilagóða skrá fyri einskiljing av teimum almennu partafeløgnum. Raðfestingin skal gerast yvir nøkur ár og á tann hátt at øll neyðugu fyrilitini eru tikin við, so at vit øll fáa mest burtur úr.

Tí bert við einari vælvirkandi vinnu klára vit at varðveita vælferðarsamfelagið.

X við lista C

Hví Fólkaflokkin tann 20 jan.

Eyðvarur Petersen
valevni Fólkaflokkinsins í Sandoynni

Í okkara samfelag skulu vit sjálvi ráða, vit skulu virka fyri at fáa ein sjálvberandi búskap og harvið valda har sum vit gjalda.

Fólkaflokkurin sigur nei at hækka skattin hjá sjófólki, men vil heldur at allur skatturin blívur lækkaður.

Fiskivinnan sum er grundarlagið fyri hesum samfelag, er eisini lívsæðrin á hesi lítlu oyggj sum vit nú búleikast á. Her er útróðurin ein týðandi partur í hvørjari bygd, Fólkaflokkurin vil at útrórarmenn við smábátum skulu fáa eina lagaligari fiskidagaskipan.

Fólkaflokkurin vil virka fyri at vit fáa eina samferðslu til Sandoynna og Skúvoynna sum kann gera at vit ikki eru ein útjaðari í Føroyum, men eina samferðslu sum ger at vit eru ein partur av øllum Føroyum.

Góðu veljarar takið saman hendur um Fólkaflokkin.

Veljið Fólkaflokkin, lista A

Aftursvar til Kaj Leo Johannesen

Jóannes Eliasen
valevni fyri Tjóðveldisflokkin í Eysturoy

Kaj Leo Johannesen krevur í Sosialinum mikudagin 14 januar, at eg biði um umbering fyri tað, eg segði í Rás 2 mánadagin 12 januar. Hetta kann eg als ikki gera.

Í Rás 2 mánadagin 12.01. segði eg "At tað føroyska fólki í tí ríkisrættarliga spurninginum gongur í ørviti"

Hesi orð kann eg á ongan hátt taka aftur. Eg skal stutt greiða frá hví.

Ein stórur partur av føroyska fólkinum er sannført um, at Føroyar eru undir teirri donsku grundlógini. At hetta einki hevur við veruleikan at gera, eru nógv prógv um. Lat meg nevna nøkur:

- allar danskar lógir, sum verða settar í gildi í Føroyum, verða settar í gildi "sambært kongiligari fyriskipan.
Henda kongiliga fyriskipan er tann heimild, vit góvu kongi 1661 til at seta lógir í gildi í okkara serstaka lóggávuøki.
Vóru vit undir teirri donsku grundlógini, var henda skipan sett úr gildi.
- Føroyar eru eitt serstakt lóggávuøki.
Vóru vit undir teirri donsku grundlógini, høvdu Føroyar ikki verið serstakt lóggávuøki, men høvdu verið í tí danska lóggávuøkinum, t.v.s. allar lógir lýstar í "Lovtidende" høvdu automatiskt komið í gildi í Føroyum.

Eitt annað dømi uppá, hvussu føroyingar eru villeiddir er:

- at ein stórur partur av føroyingum trýr, at Føroya Løgting kann hava evsta vald í Føroyum, samtíðis sum Føroyar eru undir teirri donsku grundlógini, altso samtíðis sum Føroyar eru partur av Danmark.

Hetta ber als ikki til - er á ongan hátt sambæriligt við ta donsku grundlógina, tá henda staðfestir í § 3, at eittans evsta vald er í Danmark - hjá ríkismyndugleikunum í Keypmannahavn

Villeiðingin

Tað er Javnaðarflokkurin og eisini Sambandsflokkurin - tín flokkur harra Kaj Leo Johannesen, sum vit áhaldandi og systematiskari villeiðing billar tí føroyska fólkinum inn, at tað ber til hjá Føroyum at vera partur av danska ríkinum, samtíðis sum Føroya Løgting hevur evsta vald í Føroyum.

Hetta snýr seg um okkara grundleggjandi tjóðarrættindi. Tit standa klárir at avreiða øll okkara tjóðarrættindi við tykkara ætlan um "Nýskipan" undir teirri donsku grundlógini. Tí er hetta sera álvarsamt, harra Kaj Leo Johannesen. Eg haldi at tú átti at biðið um umbering fyri á henda hátt at villeiða føroyingar.

Uppihaldspengarnir enn einaferð

Finnur Helmsdal
valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy

Ikki óvæntað er spurningurin um uppihaldspening drigin upp í valstríðið. Øll eru ikki á einum máli um hetta mál, og er helst ikki so nógv at gera við tað. Eri eins og áður sannførdur um, at tað var skeivt at koma við uppskotinum um at avtaka stuðulin til uppihaldspening, uttan at annað varð gjørt, uttan at viðgera heildarstøðuna hjá teimum persónum, uppskotið rakar.

Høvuðsorsøkin til hetta skriv er tó, at eg vil gera púra greitt, at málið um stuðul til uppihaldspening hevur púrt einki við málið um støðuna hjá einligu mammuni at gera. Talan er um tvey ymisk mál, sum eiga at verða viðgjørd hvør sær.

Eingin skal vera í iva um, at eg gangi fult og heilt inn fyri at bøta um støðuna hjá einligu mammuni. Heldur eingin skal vera í iva um, at eg eri ímóti at seta teir pápar, sum gjalda uppihaldspening, í eina torføra, og í nøkrum førum, vanlukkuliga støðu.

Og lat meg sláa rimmarfast. Einliga mamman fær ikki fleiri pengar frá tí almenna, um páparnir missa pening.

Nú snýr alt seg ikki um pening aleina. Men tess betur hesir báðir bólkarnir hava tað, tess betur hava børnini, hesi so ella so vara av, tað. Og tað eru jú børnini, vit eiga at seta í fremstu rað.

Mín støða um skrásett parlag og fosturtøku

Reimund Langgaard
valevni hjá Sambandsflokkinum í Eysturoy

Í samráði við Sosialin tann 16. januar, kann mín støða til skrásett parlag misskiljast. Tí vil eg her greitt greiða frá hvat eg meini við.

Eg eri heilt ótrúliga nógv ímóti at samkynt kunna giftast í kirkju. Haldi harumframt, at tað er ein avgerð, sum kirkjan skal taka og ikki Løgtingið.

Eg eri eisini ímóti at samkynt kunna ganga í borgarligt giftarmál (skrásett parlag). Lat tað verða sagt púra greitt.

Fosturtøka er, í mínari verð, eitt nógv álvarsligari mál enn skrásett parlag. Tað er mítt hjartamál at verja hesi 50 óføddu børnini, og tað var tað sum lá í orðunum, "at eg haldi spurningin samkynt og skrásett parlag vera ein nógv minni trupulleika enn fosturtøkumálið".